## Hægri avgjøld

Íslendska Altingið samtykti í gjár eitt uppskot frá stjórnini um at hækka ymisk avgjørd so sum meirvirðisgjaldið og avgjøldini á tubbaki, rúsdrekka og bensini, og tilsamans skulu hækkingarnar geva ríkiskassanum 14 milliardir íslendskar krónur næsta ár. Eitt nú hækkar avgjaldið á tubbaki og rúsdrekka 10 prosent á nýggjárinum. Samstundis hækka gjøld fyri ymsar almennar tænastur, sum hava verið óbroytt tey seinastu fimm árini. Eitt nú hækka rættargjøldini heili 50 prosent, og eitt mál við tí er at avmarka talið á sokallaðum smámálum, sum ofta enda í rættinum.



## Pressan gjørdi ov nógv av

Influensa A var ella er als ikki so vandamikil, sum fólk fingu at vita, og fjølmiðlarnir hava skyldina. Tað er í hvussu er niðurstøðan av einari kanning, sum danska heilsustýrið hevur gjørt, skrivar Politiken. Har svara 73 prosent av teimum spurdu, at fjølmiðlarnir gjørdu alt ov nógv av og gjørdu sjúkuna nógv vandameiri, enn hon vísti seg at vera. Men Stig Hjarvard, professari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, verjir fjølmiðlarnar og rósar teimum fyri at hava havt tunguna mitt í munninum í hesum máli. Sambært heilsustýrinum hava 300.000 danir havt Influensa A, harav helmingurin eru børn. 23 fólk eru deyð.

# Løgtingsformaðurin settur til viks

TINGARBEIÐI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er tíverri demokratiskt!

Tað staðfesti Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, um tað sum er fyri fram í løgtinginum um vikuskiftið.

Samgongan slúsaði eina ørgrynnu av málum ígjøgnum løgtingið uppá tveir dagar fyri at sleppa í jólafrí leygardagin og í tí sambandinum fekk hon Løgtingið at atkvøða um at víkja frá øllum tíðarfreistin í teimum málum, sum eru til viðgerar.

Okkurt av hesum eru stórmál, serliga figgjarlógin fyri næsta ár, sum eisini skuldi avgreiðast leygardagin.

– Tá ið ein meiriluti av løgtingslimum atkvøður fyri at víkja frá øllum tíðarfreistum, fær tingformaðurin onki gjørt uttan at akta meirilutan, segði hann við Rás2.

– Løgtingsformaðurin er settur út av spælinum, legði hann afturat.

Men hann duldi ikki fyri, at honum dámar hetta illa.

– Tað hóvar mær stak illa at umsita hetta arbeiðslagið, segði hann við Rás2.

Hann heldur, at tað er ábyrgdarloysi av grovasta slag av samgonguni at trumfa øll málini ígjøgnum.



*Tingformaðurin ivast í um tinglimir eru fullgreiðir yvir, hvat teir gera*

Og leygardagin skuldi figgjarlógin so eisini trumfast ígjøgnum, sum hann málber seg, hóast tinglimir ikki fingu hana fyrrenn seinnapartin fríggjadagin.

– Tingarbeiðið, sum skuldi verða alt heystið, varð nú trumfað ígjøgnum eftir tveimum døgum.

Hann sigur, at skipanin er so, at víkjast kann frá tíðarfreistum í serligum føri og samgongan metir so, at hetta er eitt serligt føri.

Men Hergeir Nielsen ivast í, um tinglimir rættiliga vita, hvørjum teir atkvøddu fyri, ella ímóti.

– Onki vanligt menniskja kann hava yvirlit yvir alla lóggávuna, sum varð koyrd ígjøgnum Løgtingið hesar báðar dagarnar, sigur hann, tí ongin fær høvi at hugsa seg um ella ráðføra seg við nakran og tá er ivingarsamt um tingfólk ikki altíð eru greið yvir, hvørjum tey atkvøða fyri ella ímóti.

## Vil gera Rúsuna til alment partafelag

Johan Dahl ætlar nú at virka fyri, at Rúsan verður eitt alment partafelag.

Hann sigur, so verður Rúsan púra leys av fíggjarlógini og at tað fer at geva stovninum nógv størri frælsi at virka og at leggja síni egnu viðurskifti og framtíð til rættis.

Eitt nú kann Rúsan læna pening til ávís endamál, hevur hon tørv á tí.

Johan Dahl sigur, at hetta fer at gera hana leysari av politisku skipanini og tað heldur hann, at hon hevur uppiborið.

- Tað sum fyrifórst í Løgtinginum nú ein dagin, har politikarar brúktu langa tíð upp á at kjakast um, antin Rúsan var í sínum góða rætti at brúka 1,5 millión til at flyta í nýggjan bústað herfyri, hoyrir ikki heima.

– Tað er óheppið, at politikarar viðgerða vanlig rakstrarlig viðurskifti hjá Rúsuni. Hon hevur krøv um avkast til landskassan og tí má hon fáa frælsi at virka, so hon fær útvegað hetta avkastið.

Hann staðfestir kortini, hóast Rúsan verður alment partafelag, fer tað ikki at broyta endamálið við rúsdrekkapolitikkinum tað allarminsta, tí hann skal framvegis vera at tálma nýtsluna. Tað fer heldur ikki at ávirka íkastið hjá Rúsuni til landskassan, tí hon kemur at betala vinningsbýti, akkurát sum onnur almenn partafelag.

**Áki**



*Rúsan skal hava fríari ræsir at leggja síni egnu viðurskifti til rættis, heldur Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum*

# Løgtingslimir skulu missa allar eykalønir

POLITIKARALØNIR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eftir nýggjár fer Sjálvstýrisflokkurin at leggja uppskot fyri Løgtingið um at tinglimir skulu missa allar samsýningar, sum teir fáa afturat vanligu lønini sum løgtingslimir.

Tað staðfestir Kári P. Højgaard, formaður flokksins.

Hetta kemur í kjalarvørrinum á einum uppskoti frá Sjálvstýrisflokkinum og Miðflokkinum um at víðka formansskapin úr trimum upp í fimm limir, so at teir lítlu flokkarnir eisini fingu umboð í formansskapin

Smáu flokkarnir hava eisini sett ynski fram um at eru víðka nevndina við løgtingsgrannskoðarunum, so at teir minstu flokkarnir eisini fáa umboð har.

Teir meta, at hetta gevur teimum størri møguleikar at fylgja við í politiska arbeiðnum og teir halda heldur ikki, at tað er nøkur meining í, at teir stóru flokkarnir skulu velja løgtingsgrannskoðarar sínámillum so at teir skulu sita og eftimeta seg sjálvar.

Men í hesum sambandi varð skotið teimum smáu flokkunum í skógvarnar, at teir nú vildu økja almennu útreiðslurnar, tí nevndarlimirnir fáa eyka samsýningar.

Hetta fekk teir smáu flokkarnar at føra fram, at verður hetta gjørt til ein spurning um pengar, eru teir til reiðar at leggja uppskot fyri Løgtingið um at avtaka allar eyka samsýningar, sum løgtingslimir fáa afturat vanligu lønini sum løgtingslimir av tí at teir eru limir í ymsum nevndum hjá Løgtinginum.

Kári P. Højgaard heldur eisini, at tað er heilt órímiligt, at landsstýrismenn, sum fara frá og enda í løgtinginum, skulu fáa tvær lønir í fleiri mánaðir, tí hetta kostar landskassanum milliónir. Tí fer hann eisini at skjóta upp at politikarar, ið koma soleiðis fyri, skulu bara varðveita tað hægru lønina og missa tað lægru.